# Fyrsti brúkti bilur av landinum



Feðgarnir Jákup og Heini á Borg við Iveco bilinum sum fór av landinum hósdagin
Mynd: Magnus Gunnarsson

Hósdagin í síðstu viku varð fyrsti brúkti bilurin fluttur av landinum undir nýggju løgtingslógini, sum kom í gildi 1. juni 2008. Í nýggju lógini eru greiðar ásetingar um afturgjald av virðis- og burturbeiningargjaldi, tá bilar verða fluttir av landinum.

Áðrenn 1.juni í ár vóru ongar ásetingar um at fáa skrásetingargjøld av motorakførum afturgoldiin, tá bilar verða fluttir av landinum.

Nú eru fastar mannagongdir gjørdar, og fyrsti bilurin sum varð fluttur av landinum var ein Iveco lastbilur hjá Sp/f Bilrøkt.



# Hyundai-Kia ársins bilaframleiðari

Hyundai-KIA konsernin er kosin ársins bilaframleiðari av enska bilmagasininum Autocar.

Í grundgevingunum verður sagt, at konsernin er vorðin viðurkend fyri sínar stóru ambitiónir. Eftir fáum árum er Hyundai-KIA konsernin vorðin tann 5. største bilkonsernin í heiminum aftaná Toyota, General Motors, Ford og VW-konsernin. Ein bilverksmiðja við flott designaðum bilum í góðum gjøgnumførdum kvaliteti og gevur longri garanti enn aðrir bilaframleiðarar.

Autocar er eitt av størstu og tað elsta bilmagasinið í Stórabretlandi.

# Bilrøkt við rustviðgerð

Sp/f Bilrøkt í Stiðjagøtu víðkar nú sína tænastu til eisini at umfata rustviðgerð av nýggjum og gomlum bilum.

Til hesa uppgávu er Jógvan Johansen settur í starv hjá fyritøkuni. Jógvan hevur verið í Danmark á skeiði hjá SUVO Anti-Rust, sum Bilrøkt nú umboða í Føroyum.

Umboð frá SUVO Anti-Rust í Danmark, Jørn Klint, konsulentur, er í Føroyum í løtuni í sambandi við at nýggja anleggið er tikið í nýtslu. Umleið 60 SUVO Anti-Rust støðir eru í Danmark.




Heini á Borg frá Bilrøkt, Jørn Klint frá SUVO í Danmark, og Jógvan Johansen, sum stendur fyri rustviðgerðini hjá Bilrøkt
mynd: Jens Kristian Vang



Bilrøkt bjóða seg nú fram við rustviðgerð
mynd: Jens Kristian Vang



Fiat Fiorino er av Danske Motorjournalisters Klub kosin til ársins vørubil í Danmark 2009

# Ársins vørubilur í Danmark

**Danske Motorjournalisters Klub hava kosið Fiat Fiorino til ársins vørubil í Danmark 2009**

Herfyri varð Fiat Fiorino kosin ársins vørubilur í Evropa saman við Citroen Nemo og Peugeot Bipper, sum allir verða gjørdir á somu verksmiðju. Hóast hesir bilar so at siga eru eins, valdu donsku motorjournalistarnir Fiat Fiorino framum hinar m.a. orsakað av 1,3 litra dieselmotorinum við 75 hk. Citroen Nemo og Peugeot Bipper hava sínar egnu nakað størri PSA-dieselmotorar. Fiat Fiorino kemur við partikulfiltri og ESP í januar 2009.